# Tíðin farin frá kommununum

TÓRFINN SMITH



**- Nú nærdemokrati einki hevur at siga, er eingin meining í at varðveita kommunuskipanina**

At vit hava havt – og partvíst hava enn – eitt stórt tal av kommunum, er ikki av tilvild. Tað var gott latín gjøgnum mong ár, at tess nærri myndugleikin lá hjá borgarunum, tess størri ávirkan hevði hvør einstakur borgari at mynda sítt nærumhvørvi. Hetta var tað vit kallaðu nærdemokrati.

So komu nýggjar tíðir, og við teimum ein munandi broyttur hugburður. Kommunusamanlegging var loysnin á nærum øllum trupulleikum. Tess færri kommunur, tess betri. Seinasta vit frætta í so máta er, at borgarstjórin í Skopun heldur best vera, at Sandoyggin leggur saman við Havnini. Hetta fyri at gerast partur í eini størri heild.

Ein av størstu orsøkunum til at landsins myndugleikar vilja hava færri og størri kommunalar eindir er, at tá ber betri til at leggja ymisk øki út á kommunurnar at umsita, og tað hevur eisini verið gjørt í ein ávísan mun. Hinvegin vildu almennu Føroyar hava eitt ávíst eftirlit, soleiðis at somu møguleikar vóru fyri allar borgarar, hvar í landinum teir búgva.

Uttan mun til hvussu kommunalu eindirnar verða skipaðar, fer altíð at vera munur á inntøkugrundarlagnum hjá teimum ymisku kommunalu eindunum. Meginparturin av almennu fyrisitingin er í miðstaðarøkinum, sum harvið hevur tað tryggasta inntøkugrundarlagið. Eisini er ymiskt hvussu er við býtinum millum fólk í lønandi vinnu og teimum, sum fáa almennar veitingar, og harvið er kostnaðarstøði eisini misjavnt. Fyri at viga upp móti tílíkum ójavnum, verður tosað um eina útlíkningarskipan millum kommunur.

Um tað nú veruliga er so, at besta loysnin er so fáar kommunur sum gjørligt, so má tað eisini merkja, at vit eru farin frá hugtakinum um nærdemokrati, og tí er spurningurin um allar besta loysnin ikki er: Eingin kommuna.

**Fyrimunirnir høvdu verið fleiri:**

Vit sleppa undan tveimum løgum av umsitingum,- lands- og kommunalum.

Vit sleppa undan spurninginum um ríkar og fátækar kommunur.

Vit sleppa undan spurninginum um útlíkning.

Vit sleppa undan stríðnum um uppgávu- og valdsbýti millum land og kommunur. (Hvussu hevur eldraøkið ikki verið eitt stríðsmál millum land og kommunur?)

Allir borgarar verða eins fyri, uttan mun til hvussu kommunan er fyri fíggjarliga.

Kanska fáa vit eisini tann vinning, at samlaða fyrisitingarliga orkan av hesum landi kundi verið nýtt betri, soleiðis at færri verða at klippa hvørjum øðrum, og gera størri samfelagsliga nyttu á øðrum økjum.

Havandi í huga teir góðu samskiftismøguleikar, eins og væl útbygda infrakervi vit hava í dag, hevði einki forða fyri at nýggja landsumsitingin varð skipað kring landið alt, sum eisini hevði verið heilt natúrligt.

At varðveita eina skipan, sum fyrst og fremst byggir á nærdemokrati, sum í dag ikki sýnist at hava nakran týdning, gevur onga meining. Tí eigur stigið at hava so fáar kommunur sum gjørligt at takast fult út. Ongar kommunur.

# Felags foreldralóg

ANDRIAS HAMMER
Eiði

Vit hava í dag eina virkandi felags foreldra lóg sum enn ikki er nøktandi. Eg havi í longri tíð bíðað eftir svar frá okkara góðu monnum í Tinganesi.

Hvørki Høgni Hoydal ella Kaj Leo Johannesen ynskja at svara mínum brævi. Fyrsta brævið, eg sendi til Høgna, var tann 1. juli 2008, tá hann var landsstýrismaður í uttanríkismálum.

Í einum svari eg fekk frá Anders Fogh Rasmussen við fyrispurningi um ta nýggju foreldralógina, sum kom í gildi her í Føroyum tann 01.04.2007 var onki til hindurs fyri at (forældreansvarsloven) eisini kundi virka í Føroyum. Men hettar fingu føroyskir politikarar sett stopp fyri, tíanverri.

Tá (foreldremyndighed og samvær) kom í gildi í Føroyum, vóru tað nógv sum hildu, at tað fór at blíva tann sama lógin, sum skuldi virka í øllum ríkinum. Men so var ikki. Vit fingu í staðin eina lóg, sum ikki kundi brúkast í Danmark.

Eg tosaði einaferð við Finn Helmsdal, sála, sum tá hevði málið um hendi fyri at hoyra, hvat henda lógin gekk út upp á, og hví vit skuldu sita eftir við einari lóg, sum ikki var góð nokk í Danmark. Hann segði, at tað var onki sum politikararnir í Føroyum kundu gera nakað við. Hettar var ein lóg, sum varð trýst yvir høvdið á okkum, og har var onki at gera.

Men nú havi eg fingið tað váttað í brævi frá Anders Fogh Rasmussen, svart upp á hvítt, at hettar er ikki í trá við tað, sum Finnur Helmsdal segði. Í brævinum frá Anders stendur millum annað:

»Som sagt så er forældreansvarsloven nu gennemført i Danmark, og hvis der fra hjemmestyrets side måtte være et ønske om, at loven sættes i kraft for Færøerne, er vi fra dansk side naturligvis helt indstillet på at medvirke hertil«

Eg vil heita á politikarar í Føroyum um at taka hettar í álvara og ikki bara sita og hyggja at, meðan nógvir menn muga niður við flagginum. Grundin til, at eg sigi menn, er tí, at tað í flestu førum eru menn, sum verða settir uttanfyri, og muga bara gjalda tað, sum teir eru dømdir til, uttan at hava nakra ávirkan á síni egnu børn.

»Foreldremyndighed og samvær« er ein lóg, sum virkar við góðum úrsliti í londum rundan um okkum. Tí hevði tað verið eitt ynski, um hon eisini kundi virka í Føroyum.

# Atlantic Airways – søgugerð og sannleiki

EYÐFINNUR JACOBSEN



Sveinur Tróndarson, blaðmaður á Dimmalætting, skrivar grein á síðu 2 og 3 í morgun um tað, sum er farið fram í Atlantic Airways um keypið av egnum partabrøvum.

Lat meg byrja við at siga, at stóð navnið hjá Sveini ikki undir greinini, ivaðist eg onga løtu í, at talan er um eitt partsinnlegg, tí longur frá sannleikanum um tað, sum farið er fram í hesum máli, ber neyvan til at fara.

Niðurstøðan í greinini er, at tað eri eg, sum havi skapt alt rumblið, tí eg skal hava givið seljarunum eitt tilboð, sum hevur sett leiðsluna upp ímóti nevndini.

Lat meg sláa fast, at eg í hesum máli einans havi roynt at medvirka til at loyst og ikki skapt trupulleikar til frama fyri Atlantic Airways. Tað eri eg vísur í, at Sveinur kann fáa váttað frá mínum starvsfeløgum í nevndini og øðrum limum av leiðsluni.

Eg skal minna á, at hóast eg eri stjóri í sp/f 07.12.07, eri eg ikki eigari av felagnum, sum eigur 5.6% av partapeninginum í Atlantic Airways. Eigarin er útlendskur íleggjari.

Mín lutur í søguni hjá Atlantic Airways var at vera ein av stovnarunum av felagnum í 1987 og ein av teimum, sum fyrireikaðu stovningina vegna landsstýrið. Tilsamans havi eg verið í nevndini valdur av landsstýrinum í 12 -13 ár, harav 10 ár sum formaður. Øll hesi árini havi eg einans arbeitt fyri áhugamálunum hjá Atlantic Airways og tess eigara. Í 2001 segði eg meg úr nevndini, men játtaði at taka við aftur sum nevndarlimur í fjør, tá ein stórur partur av privatu partaeigarunum heitti á meg um at taka við hesum starvi. Hetta seinasta árið havi eg, eins og áður, einans arbeitt fyri áhugamálunum hjá Atlantic Airways og øllum eigarunum.

# Viðmerking til Gerhard Lognberg

SÓLVIT SIMONSEN
Sandur



Gerhard, eg taki undir við tí mesta, tú sígur í Sosialinum týsdagin. Men at fara og trýsta Sandoyar sýslu undir Havnina, tað eri eg so avgjørt ikki við til. Eg haldi, at vit hava nokk av havnarmonnum. Vit skulu ikki trýsast undir miðstaðarøkið. tað, sum vit eiga at gera, er at fáa lagt allar sýslurnar saman og so eiga vit sum helst hann minsta kommunan at fáa serrættindi sum tann minsta kommunan, soleiðis at vit kunnu klára okkum at stýra sjálvir. Vit eiga ikki at gloyma tað, at vit eiga dýra mentan í Sandoynni og ikki at gloyma Skúgvi og Dímun. Og hetta eiga vit saman við iøllum øðrum at røkja sjálv.

Hygg at skilamanninum hjá tær í Dímun, har hann saman við hinum fólkunum har leggur rygg til nýtt arbeiðspláss, sovorðnum fólkum eigur man at hava eyguni eftir og stuðla.

Eg eri sera spentur upp á at fáa lagt sýsluna saman, í serstøðu, eftir fólkatalinum. Eg nýtist ikki at siga tær, hvussu góða oyggj, vit eiga, og ikki minst báðar útoyggjarnar, sum vit øll eiga at standa saman um at menna.

Tað seinasta, sum Gerhard Lognberg skrivar, er soljóðandi:

Sandoyggin er so mikið lítil, at tað er bara eitt hjá okkum at gera, og tað er at standa saman sum ein maður, og tað ere tað vit vinna við. Tað einasta vit kunnu gera er at standa saman og lyfta í felag.

Ja, Gerhard, her eru vit so hjartaliga einigir báðir. Men lat okkum royna sjálvir at koma fram, og ikki nálgast uppi í havnarmonnum.

-so eru tit við!